# JavnaðarCafé

JavnaðarCafé verður leygardagin 10. november kl. 10 - 15.

Valdagin 13. november verður JavnaðarCafé kl. 10 - 18.

JavnaðarCafé'in verður í Losjuni í Havn, Tinghúsvegur 18.

***Øll eru vælkomin***

**Bil á valstaðið**

Javnaðarveljarar í Suðurstreymoy, sum ynskja bil á valstaðið, eru vælkomnir at ringja á telefon 50 30 25.

**Javnaðarflokkurin**

## Hugnaløta við fyrilestri

Foreldur at børnum við autismu og líknandi trupulleikum, verða boðin til fyrilestur í MBF húsinum, Íslandsvegur 10 c, leygardagin 17. november kl. 15.

Jógvan Fríðriksson prestur heldur fyrilestur um ta sorg, at fáa barn við breki.

Eisini koma umboð frá brekdeildini á Almannastovuni at siga frá rættindunum hjá familjuni og at svara spurningum.

**Vegna fyrireikararnar**
Foreldur

## Frá Landsfelag Sløkkiliðsmanna

*Aðalfundur felagsins verður hildin á brandstøðini í Klaksvík*

**Leygardagin 10. november 2007 - kl. 11.00**

Skrá, sambært lógum felagsins.

*Mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundi, skulu vera formanninum í hendi seinast 14. dagar áðrenn aðalfundin. Eru tað mál, ið ynskist atkvøtt um, skal skrivligt uppskot fylgja við.*

---

*Uppskot skulu sendast formanninum.*

*Sørin S. Djurhuus.*
*Sjúrðargøta 7*
*512 Norðragøta*

## Lærlingur til Thomas Dam

**INTERSPORT**

## Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í, tá á stendur, ert tú vælkomin at søkja hetta læruplás. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

**P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR**
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn

## Námsfrøðingur

Dr. Margrethu Barnagarður søkir eftir námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna, frá 1. desembur 2007 ella skjótast tilber.

Høvuðsuppgávan verður, at taka sær av barnið við serligum tørvið.

Umsøkjarar við royndum innan stuðulsarbeiði og kunnleika til "Tekn til Talu" hava fyrimun.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verður annað fólk sett í starv.

Lønar- og setanarviðurskiftir eru eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og er lønarsatsurin 11/19.

Umsókn við avritið av prógvi og møguligum ummælum skulu sendast til :

**Dr. Margrethu Barnagarð**
Gerðagøta 14,
FO- 700 Klaksvík
t-post: margretha@margretha.fo

**Í seinasta lagið fríggjadagin 23. nov. 2007**

# Bassa Cup

## 2007

**Í Ítróttarhøllini í Trongisvági 17. novembur**

**Tilmelding á tlf. 572998 áðrenn 14. novembur 2007**



5+1 leikarar kunnu verða á hvorjum liði, uttan hjá drongjum og unglingum, ið kunnu hava 4+1.

**Nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerki frá Bassa**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Minipiltar (dr.+gentur) | 2001-02-03 | Gentur | 1997-98-99 |
| Smápiltar | 1998-99-00 | Gentur | 1994-95-96 |
| Piltar | 1996-97 | Gentur | 1992-93 |
| Smádreingir | 1994-95 | Gentur | 1989-91 |
| Dreingir | 1992-93 | | |
| Unglingar | 1989-91 | | |

**Luttakargjald kr. 250,- fyri liðið**

**Ungdómsdeildin**

Eik

**Smyril siglir av Havnini kl 07.00 og av Tvøroyri kl. 18.30**

# Bakara lærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læruplass leyst at søkja.

Bakaríið Grón hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. matvørutøkning.

Lærutíðin til bakara er 3 ár og 7 mðr., harav 38 vikur á tekniskum skúla í Danmark.

Ætlanin er, at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**BAKARÍIÐ GRÓN**
**Hoyvíksvegur 65**
**Tlf. 31 21 61**
**Postboks 1048**
**110 Tórshavn**